# Livandi skeljadjór í bingjum

Ein nýggjur containari, sum Mærsk júst hevur tikið í brúk, ger tað møguligt at flyta livandi skeljadjór um allan knøttin. Í hvørjum containara eru 20 tangar, sum hvør tekur 1500 litrar. Sjógvurin verður køldur niður, sum ger at skeljadjórini fara í dvala. Møguligt er at hava skeljadjórini í slíkum containara í upp til tríggjar vikur, sum er nóg mikið til at sigla úr Fjareysturi til Europa. Prísurin á feskum skeljadjórum er upp til seks ferðir betur, enn hann er á frystum skeljadjórum. Hóast tað, so hækkaði prísurin við 8,8 prosentum á feskum, meðan prísurin á frystum hækkaði við 3,3 prosentum seinasta ár.






halda vit, at tíðin er búgvin til eitt alment kjak um verkætlanina. Vit hava latið kommununi eina umsókn, og tí er málið nú politiskt, sigur Jónsvein Joensen.

Hann greiður frá, at felagið hevur havt samskift við almennar myndugleikar um verkætlanina, og teir hava góðar vónir um eina positiva viðgerð frá kommunalu umsitingini og politisku skipanini.

Vit vilja gjarna lyfta miðbýin upp á eitt altjóða støði við íbúðar-, vinnu- og trivnaðarmøguleikum og blása nýtt lív í havnalagið, greiðir Jónsvein Joensen frá.

Ætlanin er at skapa eitt umhvørvi framvið bryggjukantinum við øllum hentleikum, sum vit kenna frá havnaløgum í øðrum býum. Økið fer at kunna hýsa 7.500 fólkum í senn.

### Fígging

Kostnaðurin fyri hesa verkætlanina er í milliardaklassanum, og tí er greitt, at sterkir fíggjarligir íleggjarar mugu vera knýttir at ætlanini, fyri at hon ikki skal kvalast í føðingini.

Fyrireikararnir greiða frá, at kostnaðurin fyri hvørt byggistig liggur ímillum 150 og 300 milliónir krónur, og talan er um eini 10-15 byggistig alt eftir hvussu verkætlanin meira ítøkiliga fer at síggja út.

Tann stóri spurningurin er tí, um felagið hevur tryggjað sær fígging, og hvussu realistisk verkætlanin er. Føroyingar hava seinastu árini hoyrt um fleiri verkætlanir í hundrað milliónа klassanum. Verkætlanin í Stórutjørn hevur havt fleiri byrjunartrupulleikar, og verkætlanin uppi við Miðlon er eftir øllum at døma enn á tekniborðinum.

Vit hava fingið allar tær fíggjarligu tilsagnir, sum vit hava tørv á til at fara undir verkætlanina, og tí er hendan ætlanin sera realistisk, sigur Jógvan Joensen.

Hann vil tó ikki siga nágreiniliga, hvørjar íleggjarar talan er um.

P/F Havnar Bryggja er eitt føroyskt felag við føroyskum og útlendskum íleggjarum, og Jónsvein Joensen sigur, at felagið hevur tryggjað sær fígging til øll byggistigini í verkætlanini.

Nú skal umsóknin so viðgerast í býráðnum, men hendan ætlanin er ikki ókend hjá politikarum í Tórshavnar Býráð. Fyrsta framløgan var longu fyri einum ári síðani, men nú er ætlanin meira ítøkilig og búgvin til politiska viðgerð.

## FAKTA um verkætlanina

350 Íbúðir á 100 m2 + 5000 m2 felags

Skrivstovur og almenn hølir. 55.000 m2, umleið 2.200 skrivstovupláss.

Handlar 12.000 m2

Hotell við 250 kømurum. 23.000 m2

Konsert- og ráðstevnuhølir upp til 4.000 fólk. 10.000 m2

2100 Bilaparkeringsbásar. 52.000 m2

Bryggjan fer at hýsa upp til 7.500 fólkum í senn